# saman í 40 ár



*Hesar hittast trúliga einaferð um vikuna til at binda og at práta og tað hava tær gjørt í meiri enn eitt mannaminni. Frá vinstru sita Jonny Dimon, Ása Mortensen, Sanna Mortensen, Marita Mortensen, Lisa við Reiðlið, Astrid Tummasarson og Beinta Dam.*

slatur oftani verður misskilt. At tosa um fólk er ikki altíð ondsinnaður slatur. Tað kann eisini koma av einum positivum áhuga fyri, hvussu tað gongst ørðum og tað er ikki av tí illa, halda tær.

– Annars hava vit tosa um alt. Tað einasta, vit ikki tíma at tosa um, er neyð og elendigheit, arbeiðsloysi og politikk.

**Eitt sosialt tiltak**

Ein bindiklubbur er avgjørt eisini eitt sosialt tiltak og vit hava nógv saman, sum ikki júst hoyrir undir bindiklubb. Vit hava havt skattajakt í viðarlundini saman við einum øðrum bindiklubba. Vit hava verið útferð uppi á Nakki, har vit høvdu bæði skerpikjøt og lagkaku við okkum og vit hava eisini verið á øðrum útferðum og hava skipað fyri veitslum.

Men so er bindiklubburin heldur ikki at forsmáa sum eitt sosialt netverk. Tað kann vera sonn terapi hjá okkum at koma í bindiklubba at tosa opið og frítt um ymist viðurskifti í fullari vissu um, at tað verður hildið innanfyri. Tað hevur mangan verið gott at kunna fara í bindiklub leita sær stuðul og góð ráð, tá ið tað hevur staðið á hjá onkrum av okkum, sigur Jonny Dimon.

Til eitthvørt bindiklubbakvøld hoyrir eisini eitt vælbúgvið kakuborð - sigst.

Men tað hevur hesin bindiklubburin ongantíð lagt nakað í.

-Vit fáa okkum ein drekkamunn og okkurt afturvið. Men tað er ógvuliga sámuligt, tí tað kann ikki vera meiningin, at vit skulu stúra fyri at hava bindiklubb, siga tær.

Tær eru tó ikki júst keddar av at Jonny hevur bæði mann og son, sum er kondittari, tí har hava tey fingið manga góða kakuna.

Men hvat dámar teimum so, at nú eru eisini bindiklubbar vorðnir kanningarevni á hægri lærustovni.

Her verður sipað til kanningina hjá Anniku Skaalum um bindiklubbar, sum varð umrødd í Sosialinum herfyri.

Tað halda tær bara er heilt stuttligt, tí tær halda, at tá ið alt kemur til alt, skal týdningurin av einum bindiklubba sum sosialt tiltak ikki undirmetast.

– Tað er stuttligt at síggja, at bindiklubbarnir kring landið líkjast rættiliga nógv og at tað er sama mynstrið sum sæst aftur í øllum bindiklubbum.

– Vit kenna okkara bindiklubba aftur í tí, sum frættist úr øllum øðrum bindiklubbum, sigur Jonny Dimon.